# Semja
# millum
# Bioanalytikarafelagið
# og
# Fíggjarmálaráðið

**Sáttmálaskeið og lønarkarmur**

1. Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. januar 2023 til 1. januar 2026.
2. Semjan byggir á ein karm á 3,8% fyri 2023, 4,2% fyri 2024 og 4,75% fyri 2025.

Tann 1. januar 2023 hækkar lønin 3,8%
Tann 1. januar 2024 hækkar lønin 4,2%
Tann 1. januar 2025 hækkar lønin samsvarandi lønartalvuni fyri 2025.

**Yvirflyting í nýggja lønartalvu í 2025:**
Tann 1. januar 2025 flyta bioanalytikarar við sama starvsaldri:
Tey sum eru á lønarstig 1 flyta á lønarstig 1
Tey sum eru á lønarstig 2 flyta á lønarstig 2
Tey sum eru á lønarstig 5 flyta á lønarstig 3
Tey sum eru á lønarstig 9 flyta á lønarstig 4
Tey sum eru á lønarstig 18 flyta á lønarstig 5

**Skalagongdin hjá leiðarum:**
Toymisleiðari, varaleiðari, deildarbioanalytikari, KT- bioanalytikari og bioanalytikaraundirvísari eru á stig 6
Leiðandi bioanalytikari á Klaksvíkar- og Suðuroya sjúkrahúsum eru á stig 7
Leiðandi bioanalytikari/Funktiónsleiðari á Landssjúkrahúsinum eru á stig 8
Depilsleiðari á stig 9

**Broytingar í sáttmalanum:**
§ 10 Tilkallivakt

Í § 10, stk. 1 stendur..... Um so er, má starvsstaðið meta um vaktin skal boytast til vakt II (vaktarrúm) ella geva samsýning fyri nýtslu av egnum akfari ella fyri hýruvogn...... verður broytt til:

Verður egið akfar nýtt, verður skattskyldug viðbót latin á kr. 125,- fyri hvørt uppkall, galdandi fyri alla vaktina.

**Ásetingar um barnsferð í § 15**

Bioanalytikari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
*Stk. 2.* Bioanalytikari, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann bioanalytikari fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær bioanalytikarin farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.
*Stk.3.* Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.
Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.
Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024.

Í Tinganesi 21. mars 2024

Fíggjarmálaráðið

Bioanalytikarafelagið